Regional Master plan

ØKISÆTLAN FYRI TÓRSHAVNAR KOMMUNU SUM FRAMTÍÐAR SÚKKLUBÝUR

VISIT TÓRSHAVN, FAROE ISLANDS

Interreg
Northern Periphery and Arctic
Co-funded by the European Union
SUB
Visit Tórshavn



Innihalds yvirlit

01 Innleiðing

1.1 Masterplan tilgongdin og SUB 1

1.2 Hví súkkla? 1

02 Visiónin

2.1 Tórshavn sum súkklubýur 2

2.2 Hvat vil kommunan? 2

03 Støðan í dag

3.1 Hvussu er støðan í dag? 3

3.2 Súkkling - ein partur av loysnini 4

04 Framtíðin

4.1 Lyklin til eitt framtíðartrygt súkklunetverk 5

4.2 Styrkja smáar fyritøkur 6

05 Niðurstøða

5.1 Niðurstøða 7

1.0 Innleiðing

1.1 Masterplan tilgongdin og SUB

Henda økisætlanin fyri súkkluferðavinnu er ment av Visit Tórshavn gjøgnum verkætlanina SUB – Sustainable Arctic and Peripheral Biking Tourism.
Tilfarið byggir á royndir frá verkætlanini, umframt samrøður og verkstovur við viðkomandi partar í Tórshavnar kommunu. Tilfarið er savnað í verkætlanartíðarskeiðinum frá 2023 til 2026.

Endamálið við økisætlanini er at gera vart við avbjóðingar og møguleikar, sum súkkluferðavinnan hevur við sær í Tórshavnar kommunu. Somuleiðis skal ætlanin vísa á, hvussu súkkluferðavinnan kann styrkja lokalsamfelagið og skapa nýggjar inntøkumøguleikar hjá smáum fyritøkum, sum beinleiðis og óbeinleiðis arbeiða við ferðavinnu, tænastum og upplivingum.

Økisætlanin skal virka sum eitt strategiskt amboð, ið kann stuðla undir framtíðar íløgur, samstarv og menning av súkklutengdari ferðavinnu í kommununi.

1.2 Hví súkkla

Súkkling er ein av mest burðardyggu og heilsugóðu ferðsluháttunum, sum vit hava. Hon minkar um útlát, økir um likamliga rørslu og gevur bæði íbúgvum og vitjandi ein annan møguleika at uppliva bý og náttúru.

Fyri ferðafólk gevur súkkling eina meira nærverandi uppliving av økinum. Ferðin er hægri enn til gongu, men samstundis nóg lág til, at ferðafólk kunnu steðga á hjá lokalum fyritøkum, kaffistovum, handlum og mentanarstøðum á leiðini.

Í Føroyum, har frástøðurnar eru stuttar og nógv øki eru atkomulig innan stutta tíð, hevur súkkling serliga stóran menningarmøguleika. Við el-súkklum eru hæddarmunir og longri teinar ikki longur ein forðing á sama hátt, sum teir áður hava verið.

2.0 Visión

2.1 Tórshavn sum súkklubýur

Tórshavn skal vera ein tryggur, atkomuligur og burðardyggur súkklubýur í Norðuratlantshavi. Kommunan skal bjóða bæði borgarum og vitjandi eitt samanhangandi netverk av súkkluleiðum, sum knýtir býin, bygdirnar, náttúruna og ferðavinnutilboð saman.
Súkkling skal vera ein natúrligur partur av upplivingini hjá teimum, ið vitja kommununa, og eitt upplagt val hjá teimum, ið búgva og arbeiða her.

2.2 Hvat vil kommunan?

Í Umhvørvispolitikkinum hjá kommununi fyri 2026-2032, er málið at kommunan skal vera CO2 neutral í 2040. At betra um súkkluumstøðurnar, kann vera við til at minka um útlátið av vakstrarhúsgassum.

Kommunan ynskir:

- At menna tryggar og samanhangandi súkkluleiðir.
- At gera súkkling til ein týðandi part av grøna ferðsluskiftinum.
- At stuðla undir burðardygga ferðavinnu.
- At minka um trýstið frá bilaferðslu í útvaldum økjum.
- At skapa nýggjar vinnuligar møguleikar hjá lokalum fyritøkum.
- At styrkja sambandið millum súkkling, náttúruupplivingar og mentanarupplivingar.


3.0 Støðan í dag

3.1 Hvussu er støðan í dag?

Tórshavnar kommuna hevur góðar fortreytir fyri súkkling, men verandi umstøður eru ikki nøktandi.
Sambært verkstovuni, sum varð hildin í mai 2025, um súkkling vísa bæði borgarar og brúkarar á fleiri grundleggjandi avbjóðingar:

- Manglandi samanhangandi súkklunet.
- Ov fáar súkklubreytir.
- Manglandi skelting og vegvísing.
- Ótryggleika í ferðsluni.
- Ov stóran dominans frá bilaferðslu.
- Ov fáar umstøður til parkering, viðlíkahald og tænastur hjá súkklarum.
- Manglandi kunning og marknaðarføring av súkklumøguleikum.

Hóast talið av súkklum veksur, ferðast framvegis ein sera lítil partur av fólkinum við súkklu samanborið við bil. Hetta vísir, at stórur menningarmøguleiki framvegis er til staðar.
Fyri ferðafólk merkir hetta, at tað kann vera torført at finna tryggar leiðir, fáa neyðuga kunning ella finna tænastur á leiðini.



(a) 2019 (b) 2024

Mynd 4: Ein samanbering millum 2019 og 2024 vísir smáar broytingar í ferðsluháttum:

Høvuðspunktini síggjast í Tabel 2 niðanfyri.

Flutningsháttur	2019	2024	Broyting
Bilur	81%	78%	↓ -3%
Ganga	10%	13%	↑ +3%
Almenn ferðsla	7%	5%	↓ -2%
Súkklur	2%	3%	↑ +1%

Tabel 2: Broyting í flutningsháttí í 2019 og 2024


3.0 Støðan í dag

3.2 Súkkling – ein partur av loysnini

Súkkling kann vera ein partur av loysnini upp á fleiri av teimum avbjóðingum, sum kommunan stendur yvirfyri.
Við fleiri súkklandi kunnu vit:

- Minka um ferðslutrýst í býnum.
- Minka um CO_2-útlát.
- Skapa meira livandi býarrúm.
- Fremja heilsu og trivnað.
- Styrkja grøna profilin hjá kommununi.
- Bjóða ferðafólki burðardyggari upplivingar.

Samstundis er súkkluferðavinna ein ferðavinnugrein í vøkstri kring Europa, og nógv ferðafólk leita eftir upplivingum, sum sameina rørslu, náttúru og lokala mentan.



4.0 Framtíðin

4.1 Lyklin til eitt framtíðartrygt súkklunetverk

Skal Tórshavn gerast eitt attraktivt stað fyri súkkluferðafólk, krevst ein miðvís menning av infrakervinum.

Fylgjandi átøk eiga at verða raðfest:

Tryggar høvuðsleiðir
Eitt samanhangandi netverk av høvuðssúkkluleiðum skal binda saman miðbýin, havnaøkið, Hoyvík, Argir, Kaldbak, Kollafjørð og aðrar bygdir í kommununi.

Skelting og vegvísing
Greið skelting skal vísa leiðir, fjarstøður, upplivingar og tænastur. Hetta ger tað lættari hjá bæði borgarum og ferðafólki at ferðast.

Súkklustøðir
Súkkluparkering, løðistøðir til el-súkklur, pumpustøðir og smærri viðlíkahaldsstøðir skulu setast upp á strategiskum støðum.

Talgild loysn
Ein felags talgildur pallur kann savna leiðir, kort, tænastur og upplivingar fyri súkklandi.

Samstarv við almennan flutning
Súkkling og almennur flutningur skulu virka saman soleiðis, at ferðafólk lættliga kunnu sameina buss og súkklu.

4.0 Framtíðin

4.2 Styrkja smáar fyritøkur

Ein vaksandi súkkluferðavinna kann skapa nýggjar vinnumøguleikar í allari kommununi.

Møguleikar fevna um:

Súkkluleiga
Lokalar fyritøkur kunnu bjóða útleigan av vanligum súkklum, el-súkklum og útgerð.

Ferðaleiddar túrar
Lokalar ferðaleiðarar kunnu menna tematiskar súkklutúrar við fokus á mentan, mat, søgu og náttúru.

Mat- og kaffisteðg
Súkklandi ferðafólk steðga oftari á leiðini enn ferðafólk í bili. Hetta kann gagna kaffistovum, matstøðum, matvognunum og smáum handlum.

Gisting
Smærri gistingarhús kunnu menna tænastur serliga ætlaðar súkkluferðafólki, eitt nú trygga súkkluparkering, turkiumstøður og hent amboð til súkklur, til dømis pumpur.

Viðlíkahald og tænastur
Verkstøð, mekanikarar og aðrar fyritøkur kunnu fáa nýggjar kundabólkar.

Lokalar upplivingar
Bóndagarðar, matframleiðarar, listafólk og mentanarstovnar kunnu gerast natúrlig steðg á súkkluleiðum og soleiðis fáa fleiri vitjanir.

Við eini miðvísari menning av súkkluferðavinnu, kann virðið av hvørjum ferðafólki spjaðast út á fleiri smærri vinnurekandi, heldur enn at savnast á fáum støðum.

5.0 Niðurstøða

Tórshavnar kommuna hevur stórar menningarmøguleikar innan súkkluferðavinnu.
Í dag eru avbjóðingar við trygd, skelting, súkklubreytum og tænastum, men júst hesar avbjóðingar vísa eisini á tey øki, har størstu møguleikarnir liggja.

Við at menna eitt samanhangandi og trygt súkklunetverk, styrkja samstarvið millum kommunu og vinnulív, eins og skapa betri karmar fyri bæði borgarar og ferðafólk, kann Tórshavn gerast ein fyrimynd innan burðardygga súkkluferðavinnu í Norðuratlantshavi.

Súkkluferðavinna er ikki bara ein vøra. Hon er eisini eitt amboð til at styrkja lokalsamfeløg, skapa nýggjar vinnumøguleikar, fremja fólkaheilsu og stuðla undir grøna skiftið, sum kommunan longu hevur sett sær fyri.



Visit Tórshavn

Interreg

Co-funded by the European Union

Northern Periphery and Arctic

SUB

